## Fulltrúi til Dátueftirlitið

*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.*

*Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Innlendismálaráðið.*

*Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.*

*Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum.*

*Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um bert fer fram í samsvari við lógina.*

*Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skáseting og viðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.*

*Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.*

*Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða løggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til 3/4-tíðar starv til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum at byrja sum skjótast.

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjøllbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðin og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi herundir dagføring av heimasíðu við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Faklig førleikakrøv**
Krav er, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærusetri innan samfelagsvísindi so sum løgfrøði, útbúgving innan almenna fyrisiting ella líknandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleiki til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Marionnu á Dul, fulltrúa á Dátueftirlitinum, tlf. 314763 fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Dátueftirlitinum
Tinganes
Postboks 64
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2005

## Evangelisk vekingarmøtir í Suðuroynni

**Í døgunum 21.-23. januar 2005 verða hesi møtir í Framtíðini í Vági**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjakvøldið 21. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Leygarkvøldið 22. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Sunnukvøldið 23. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |

**Í døgunum 28.-30. januar 2005 verða hesi møtir í Framtíðini í Vági**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjakvøldið 28. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Leygarkvøldið 29. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Sunnukvøldið 30. januar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |

**Hesi luttaka við talu, sangi og vitnisburði:**
Margar Toftegård, Olvheðin Jacobsen, Valdemar Simonsen, Hjalgrím Davidsen, Árni Kjærbæk, Jóannes Mortensen, Regin Drangberg, Jógvan Lamhauge, Hallmar & Hedvig Hentze, Nimrod & Ebba Midjord, Jørgin, Frants & Hjørdis Jørgensen, Gulak & Jónhilda Hansen, Thomas J. Askham, streingjakórið í Porkeri og Trioin í Soli Dio Gloria.

**Bønartænastan:** Høvi er at ringja inn bønarevnir, ella um ein ynskir persónliga samtalu, er tú vælkomin at ringja **597 597.**

***Hebr. 13.8.*** *Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir*

**Hjartaliga vælkomin til møtini í Framtíðini í Vági**

## Leiðslan fyri fundarrøðina

Sosialurin 341800

## Ársveitslan hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdafelagnum Varðanum

**Ársveitslan verður í bygdarhúsinum, leygarkvøldið 12. februar kl. 19.30.**

**Allir Hósvíkingar, úti og heima, eru vælkomnir.**

**Kostnaðurin fyri veitsluna er kr. 180,-**

| | |
|---|---|
| **Forrættur:** | Fesk súpan |
| **Høvuðsrættur:** | Lambskjøt |
| **Omaná:** | Ísur við frukt |

**Undir borðhaldinum verður gott skemt**

**Eftir borðhaldið verður rimmar dansur**



Seinasta freist at keypa atgongumerki, er mánakvøldið 7. februar, kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi.

**Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdafelagið Varðin**

Sosialurin 341800




FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026